DAGSINS MEINING

Í fagrasta blóma

Tann seinasta vikan er dømi um, at mentannarlívi› í Føroyum stendur í fagrasta blóma.

Hesa vikuna hava vit sæ›, at vit eiga ein tann fremsta listarmannin í Evropa. Konsertin í Nor›urlandahúsinum til minnis um svian Bjørn Afzelius vísti, at vit hava úrmælingar í tónleiki, og at vit ikki bara hugsa og virka innan fyri okkara egna eingjargar›. Vit hava sæ› bók um føroyska bátin, sum skarar framúr millum bøkur og ritger›ir. Harafturat vísti kvøldsetan til minnis um Jørgen-Frantz Jacobsen, at vit eru frammarliga, tá ta› sn‡r seg um tónlistasmí› og sanglist. Harafturat koma onnur tiltøk í høvu›sста›num og kring landi› í hesum tí›um. M. a. kvøldsteur um sjónleikahøvundan Daroi Fo og málfrø›ingin og yrkjaran Christian Matras. Harafturat koma allar bøkurnar og fløgurnar, sum dagliga koma út hesa ársins tí›.

Hesi nevndu tiltøkini og útgávur vísa, at vit hava virkin mentafólk á nógvum økjum. Ta › eru fólk, sum leggja nógva orku í list sína, bæ›i sum arbei›i og serliga í frítí›ini.

Alt hetta virksemi fer fram, hóast vit fer› eftir fer› hoyra, at vit hava ikki ein or›a›an mentanarpolitikk. Hvørki í landshøpi ella í kommunalum høpi.

Og at vit heldur ikki sams‡na mentanarfólk - serliga ikki rithøvundur - fyri tey avrik teir leggja í hondum.

Sjálvandi skulu vit or›a ein mentanarpolitikk, sum tekur stø›i í tí vit hava og í teimum málsetningum, vit seta okkum. Harafturat eru óiva › tey flestu samd um, at vit eiga at hava rá› at løna sjónleikarum og at vit eiga at hava rá› til at lata rithøvundar fáa løn á ein ella annan hátt, tá teir skriva størri ella smærri verk.

Hetta hevur stóran t‡dning, tí vit eru jú eitt rættiliga avmarka› máløki, og bara lítil partur av okkara bókmentum ver›ur t‡ddur til onnur mál. Harafturat kemur, at vit eiga at gera alt vit kunnu fyri at verja og stimbra mál okkara, sum er fyri útlendskari ávirkan hvønn dag frá morgni til myrkurs.

Ø›rvísi er vi› okkara málningalist. Landamørk for›a ikki fólki at skilja fagurliga list. Ta› síggja vit eisini í hesum døgum, nú fleiri føroyingar fara at s‡na fram føroysk listarverk í einum av heimsins høvu›sstø›um innan list - í sjálvum New York. Aftur eitt dømi um at føroysk mentan er í føgrum blóma.

NØVN Í VIKUNI

Minningaror› um Arnbjørn R. Thomsen

Ein av teimum sum var vi› at stovna eitt av heimsins elstu froskmannafeløgum nevniliga Tórshavnar Froskmannafelag er ikki millum okkum longur, bo› vóru eftir honum, tá i› hann sum so mangan vitja›i undir vatnskorpuni, sum mangir vi› honum hava ein serligan tokka til.

Ta› er serliga í hesum sambandi ætlanin er at minnast Arnbjørn, sum eins og á nógvum ø›rum økjum, av fullum huga virka›i til frama fyri froskmannafelagi›.

Eg minnist tá eg og fleiri vi› mær sum stórir smádreingir mangan eygleiddi hesar ungu garpar sum uttan búna av nøkrum slagi, kava›u, bæ›i til stuttleikar og fyri at forvinna sær eitt sindur av lummapengum. Arnbjørn var sjálvandi mitt í øllum, teir høvdu fingi› eitt oksygentól frá Kjartani Mohr og eg minnist væl ein kaldan vetrardag tá i› Arnbjørn kava›i vi› hesum tóli og tók fríholt upp fyri Tórshavnar Havn, tá var einasti kavarabúnin ein skipstroyggja.

Aftaná skúlatí›ina fór Arnbjørn sum so mangur annar til Keypmannahavnar í útbúgvingarørindum, men arbei›i› fyri felagi› lá ikki eftir heima minni enn so, ta› var í hesum árum at felagi› fekk altjó›a vi›urkenning og limaskap í altjó›a felagsskapinum CMAS enntá undan danska felagskapin. Hesin limaskapur gav føroyskum froskmonnum høvi at luttaka í altjó›a kappingum, og solei›is kom Arnbjørn á fyrsta sinni til Cuba, til eina oyggj og eina samfelagsskipan, hann sí›ani hevur haft ein serligan tokka til, hann hevur sí›ani ikki veri› til at vika í síni sannføring um, at hetta var rætta lei›in, sjálvt ikki tá i› alt datt sundur eystanfyri.

Hesa tí›ina kom Froskmannatí›indi regluliga út og nógv av tí, i› har var› skriva› stó› Arnbjørn fyri eins og hann stó› fyri bla›num meginpartin av tí›ini ta› kom út. Men ta› var ikki bert her at ta› var› skriva›, væl lá fyri og dúgliga var› tjaka› í blø›unum. Hvør minnist ikki tí›indabrævi› frá Cuba sum var› lisi› í útvarpinum.

Ta› var ein minnisrík tí› at minnast aftur á, nógv tiltøk vóru, og vit vóru nógvasta›nis bæ›i innan og uttanlands, Arnbjørn tók sær altí› av tí praktiska og væl gekst, vit komu vegin fram, um ta› var til Klaksvíkar á landsfelagsstovnu ella til heimsmeistaraskap í spjótfisking í Italiu, ta› var altí› gott og stuttligt at vera vi› í fer›ini, har Arnbjørn var vi›.

Sum frálei› komu a›rar uppgávur at taka yvir; hugsjónirnar komu fram í »Fríu Føroyar«, og »Brigadurnar« fóru til Cuba, so var ta› familian og arbei›i›, fyrst Hjá Esmari og so hjá Blákross. Men vit í Froskmannafelagnum eru honum sera takksamir fyri at hann var vi› at slóa fyri og seta skjøtil á. Vit hava eitt livandi felag vi› einari langari hendingaríkari søgu og eina framtí›.

Takk fyri Arnbjørn.
Vegna Tórshavnar Froskmannafelag
Knúd

Bergur Hansen, djóralækni

Heri Joensen, prestur

Heri Kragesteen, sálarfrø›ingur

Ingi Højgaard, løgfrø›ingur

Jens Andreassen, lækni

Jóhanna á Tjaldraflatti, fø›slu/húsarhaldsfrø›ingur

Jón Klein Olsen, politistur

Jón Kragesteen. Fer›slutrygd

Julianna Næs, pedagogur

Sjúr›ur Johannesen, sosialrá›gevi

Turid Thomsen, lestrarveglei›ari

Marius Staksberg, málfrø›ingur

†

Kunngjørt ver›ur fyri ætt, vinum og kenningum
at kæra mamma, omma, langomma
og vermamma okkara

Johanna Dorthea Nielsen, fødd Lydersen
vanliga nevnd Hanna

anda›ist á Landssjúkrahúsinum
mikudagin 29. nov. 80 ára gomul.
Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum heim
í Havnar kirkju fríggjadagin 1. desember kl. 17.00.
Jar›arfer›in ver›ur úr Havnar kirkju
leygardagin 2. desember kl. 13.00.

Fyri tey avvar›andi
Jógvan G., Jonna, Selma, Bjørgfinnur og Jákup

Spyrji› serfrø›ingarnar

Adressan:
Sosialurin,
box 76,
110 Tórshavn,

Fax 314720
ella teldupost:
spyr@sosialurin.fo

– og merki›, hvørjum tit seta spurningum.

Svarini ver›a prenta› í bla›num mikudag

Sosialurin

Sosialurin
Stovna›ur: 1927
Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Bla›stjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tí›indalei›ari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Markna›ardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

Bla›fólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Ey›un Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turi› Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Sveinur Tróndarson sveinur@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmi›stø›in

Avgrei›sla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Bla›i› ver›ur prenta›
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

L‡singar

Freistir:	Tekstl‡singar	Størri l‡singar	L‡singartorgi›	Heilsanir
T‡sdagsbla›i›	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsbla›i›	T‡s. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsbla›i›	Mik. kl. 10	T‡s. kl. 15	T‡s. kl. 12	T‡s. kl. 12
Fríggjadagsbla›i›	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsbla›i›	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri l‡singar, sum nógv arbei›i stendst av, mugu vera inni í gó›ari tí› og á›renn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbi›jast í gó›ari tí›.

Stødd:
Ein heil sí›a í Sosialinum er 254mm brei› og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmi› millum teigarnar er 4mm.

Fekk teknirø›ina aftur í heysin

Ikki øll eru áhuga› í at selja provokerandi teknirø›ina hjá Jógvani á Høvdanum

TEKNIRØ‹
Ey›un Klakstein

Jógvan á Høvdanum, yngri, dámar væl at arga vi› síum tekningum, og hann hevur eftir øllum at døma arga so illa, at summi vilja eiki hava vi› teknirø›ina hjá honum at gera.

Í vikuni fekk hann at vita frá eini kiosk í mi›b‡num í Havn, at teimum dámdi ikki n‡ggju teknirø›ina hjá honum, og at tey tí ikki vildu selja hana. Hann fær tí øll eintøkini sendandi retur.

– Onkur kiosk hevur sagt nei framman undan til at selja mína teknirø›, men hetta er so fyrsta kioskin, sum sendir mær teknirø›ina aftur, tí tey hava funni› út av, hvat er í henni, sigur Jógvan á Høvdanum.

– Eg haldi, at ta› er løgi› at sama kiosk uttan trupulleikar kann selja donsk vikubløø vi› naknum konufólkum. Í mínari teknirø› er einki naki› konufólk, sigur hann.

Selt væl

Jógvan á Høvdanum, sum seinastu tvey árini hevur tekna› Totalt langt úti í ungdómsbla›num hjá Dimmalætting, hom fyri einum mána›i sí›ani vi› vínu fyrstu teknirø›.

Teknirø›in hevur eisini fingi› navni› Totalt langt úti, og hon er eisini enn meiri ágangandi og avbjó›andi enn teir strimlarnar, sum fólk kenna frá Krydd.

– Tey ungu hava tiki› væl ímóti teknirø›ini, men summi tilkomin fólk hava skelda› meg út, tí eg tekni sovor›i› b‡tt og ljótt, sigur Jógvan á Høvdanum.

Tekningarnar hjá Jógvan á Høvdanum eru eftir øllum at døma so langt úti, at summi vilja ikki kennast vi › teknirø›ina hjá honum

Higartil eru eini 500 eintøk av Totalt langt úti seld, men Jógvan á Høvdanum vónar, at ta› koma at liggja nakrar av hansara teknirø›um undir jólatrøunum seinni í mána›inum.

Næraberg farin til fiskiskap

Umvældi Næraberg fór mikudagin aftur til fiskiskap. Vi› eru 73 fólk, harav 13 konufólk

Mikudagin fór trolarin Næraberg aftur til fiskiskap. Hann fer at royna eftir svartkjafti í føroyskum og íslendskum sjógvi.

Næraberg hevur seinastu tí›ina veri› til umvælingar í Noregi, og ta› arbei›i› var› seinka› einar tríggjar vikur. Ætlanin var, at Næraberg skuldi koma aftur í oktober mána›i, men ta› helt ikki.

Í Noregi er ymiskt arbei›i› gjørt vi› á fabrikkini, som er munandi broytt. Máli› vi› umvælingunum er, at meira skal fáast burtur úr fiskinum.

73 fólk eru vi› Næraberg, nú hann er farin avsta›. Av teimum eru 13 konufólk. Skipari er Ólavur Biskopstø.

ek

Ungdómar kjakast um politikk

Um vikuskifti› skipar Føroya Ungdómsrá› fyri politiskari rá›stevnu úti í Nólsoy. Fimm ungmannafeløg ver›a umbo › a › á fundinum, og f‡ra høvu›sevni ver › a umrødd á rá›stevnuni, sum ver›ur alt vikuskifti ›

POLITISKUR FUNDUR
Stefan í Skorini

Hóast kommunuvali› er fari› afturum bak, er framvegis møguleiki at fara á politiskan fund og rá›stevnu. Ta› er FUR saman vi› politisku ungmannafeløgunum, sum skipar fyri ungdómspolitiskari rá›stevnu og almennum fundi úti í Nólsoy. Rá›stevnan er fyri limir í politisku ungmannafeløgunum, men øll hava møguleika at koma á almenna fundin í skúlanum.

Fríggjakvøldi› hevur Edvard Joensen, bla›ma›ur, fyrilestur um politiska ideologi og at halda seg til eina stevnuskrá. Sí›ani ver›ur or›askifti millum luttakararnar.

Leygardagin ver›ur kjakast um nøkur brei› politisk evni, sum eru frammi í dagsins politiska kjaki. Lagt ver›ur til brots kl. 9, tá evni› ver›ur flóttafólkapolitikkur, og ta› ver›ur Ungmannafelagi› Samband, sum leggur fyri.

Næsta evni› ver›ur oljuvinnan, og tá leggur Sosialistiskt Ungmannafelag fyri. Tri›ja evni› ver›ur um privatiseringar, tá Fólkafloksungdómur leggur fyri. Fjór›a og seinasta evni› ver›ur Føroyar í alheimssamfelagnum, og leggur Unga Tjó›veldi› fyri. Or›askifti ver›ur um hvørt evni.

Leygarkvøldi› ver›ur almennur fundur í Nólsoyar skúla, har evni› ver›ur okkara samfelag 2020. Or›st‡rari ver›ur Edvard Joensen, og øll eru vælkomin at luttaka á fundinum. Til ber at fara vi› Rituni úr Havn kl. 15 leygardagin, og møguleiki ver›ur at gista í skúlanum og fáa bæ›i náttur›a og morgunmat fyri 100 krónur.



Nólsoyar bygd ver›ur um vikuskifti› karmur um ungdómspolitiska rá›stevnu og almennan fund um Føroyar í 2020